Undirvísingartilfar
At ferðast á netinum




# Ábyrgdarringarnir

*Grundspurningur:*

**Hvørjum hevur tú ábyrgdina av á netinum?**

# Ábyrgdarringarnir – Inngangur

Hetta heftið er nummar eitt í røðini av teimum seks tættunum til undirvísingartilfarið *At ferðast á netinum* og er til tín sum lærari, ið vil undirvísa og vegleiða næmingum at ferðast trygt á netinum.

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv til skilagóðan atburð, og hvussu vit tryggja okkara privatlív, og hetta er nakað sum tú, sum lærari, kann hjálpa við.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum tryggjar, at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið teir reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.



















**Ábyrgd:** SSP-ráðgevingin.
**Útgivið:** 2017/2022.
**Málbólkur:** Miðdeild 4.-6. flokkur.
**Lærugrein:** Kristnikunnleiki.
**Umbrotið, prentað og heft:** Føroyaprent.
**Samband:** Um tú sum lærari, foreldur ella fakfólk hevur spurningar ella tørv á vegleiðing til tilfarið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80

# Undirvísingargongd

| | |
|---|---|
| Skúlaár | |
| Skúli | |
| Floksheiti | |
| Floksstig | Miðdeild 4.-6. flokkur. |
| Lærugrein | Kristnikunnleiki. |
| Lærari | |

| | |
|---|---|
| Heiti | At ferðast á netinum – Ábyrgdarringarnir. |

| | |
|---|---|
| Førleikamál | **Støðisførleikar**<br>At virða, at samskipa og at kanna.<br><br>**Fakligir førleikar**<br>Átrúnaður, lívsfatan og siðfrøði.<br>• At samtala um tilveruspurningar.<br>• At samtala um siðvenju og siðalagsligan hugburð og atferð.<br>• At samtala um ábyrgd av okkum sjálvum, medmenniskjum og náttúru.<br><br>Høvuðstættirnir í kristnari trúgv, list og mentan í søguligum og nútíðarligum høpi.<br>• At tosa um høvuðstættirnar í kristnari trúgv. |
| Tímatal | Undirvísingartímar tilsamans umleið 20.<br>Til evnið *Ábyrgdarringarnir* skulu nýtast 1-2 dupulttímar í kristnikunnleika. |
| Undirvsingarmiðlar | Tilfar, sum er gjørt til hetta undirvísingarevni, næmingaskjøl og heimasetningur. |
| Arbeiðshættir | Floksundirvísing, kjak, skrivligar uppgávur og bólkaarbeiði. |

| | |
|---|---|
| Eftirmeting (sendast til SSP-ráðgevingina eftir útfylling) | Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin? |
| | Var tímatalið hóskandi? |
| | Í hvønn mun rukku næmingarnir førleikamálunum? |
| | Var tilfarið hóskandi? |
| | Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir? |
| | Uppskot til broytingar |

## Grundspurningur:

Hvørjum hevur tú ábyrgdina av á netinum?

## Samanumtikið:

Næmingar kanna, hvat tað merkir at taka ábyrgd, bæði tá tað snýr seg um at samskifta á netinum og andlit til andlits, soleiðis at teir kunnu læra at bera seg rætt at á netinum.

Næmingarnir sita í ringum, sum ímynda ábyrgdarringarnar, fyri á henda hátt at kanna, hvørja ábyrgd teir hava av sær sjálvum, vinum og familju umframt samfelagnum og umhvørvinum sum heild – bæði á netinum og uttanfyri netið.

## Lærusetningur:

Næmingarnir:

- Hugsa um sína ábyrgd, tá teir eru á netinum.
- Hugsa um sína ábyrgd, tá teir ikki eru á netinum.
- Læra, at góður atburður á netinum krevur virðing og ábyrgd.

## Fyrireiking:

*Nýt talvu*

Mynda ábyrgdarringarnar í flokshølinum. Ringarnir skulu vera so stórir, at næmingarnir antin kunnu sita ella standa í teimum. Tú kanst nýta klistriband, band, stólar ella annað at mynda ringarnar við. Um til ber at vera úti, kann krit nýtast.

Skriva út *næmingaskjal 1* (síða 7) og *2* (síða 8). Eitt av hvørjum til hvønn næming. Næmingar skulu nýta saks.

Skriva út *Heimasetningur* (síða 9), sum børnini fáa heim við til foreldrini.

### *Upphiting: 10 minuttir*

Tekna ringarnar á talvuna.
Spyr næmingarnar, hvørjum hetta líkist.

**Dømi svar:**

- Eitt bullseye
- Dartskiva
- Tríggir ringar

Sig frá, at ringarnir minna teg á ábyrgdarringarnar. Greið frá orðinum ábyrgd, og hvat tað merkir í hesum sambandi.

Greið frá myndini á talvuni, sum vísir, hvussu ábyrgdin hjá okkum veksur, frá at vit hava ábyrgd av okkum sjálvum, til at vit eisini hava ábyrgd av heiminum kring okkum. Hvør ringur ímyndar ein persón ella ein bólk, sum vit hava ábyrgd av.



*Uppgáva 1: 15 minuttir*

# Ábyrgd uttan fyri netið

Vit fara nú at nýta ábyrgdarringarnar til at hyggja at ymsu sløgunum av ábyrgd, næmingarnir hava í gerandisdegnum. Tað kann vera ábyrgd av sær sjálvum, vinum og familju, umframt samfelagnum kring tey.

- Tey sjálvi: Innasti ringurin ímyndar ábyrgdina, ið næminganir hava av sær sjálvum. Til dømis at tey ansa eftir at vera sunn, trygg og ansa eftir sínum umdømi.
- Vinir og familja: Mittasti ringurin ímyndar ábyrgdina, ið næmingarnir hava av vinum og familju. Til dømis at hjálpa til heima, fara til framførslur hjá hvørjum øðrum ella bara at lurta, um vinir hava trupulleikar.
- Samfelagið: Uttasti ringurin ímyndar ábyrgdina av samfelagnum. Til dømis at fylgja reglum í skúlanum ella í ferðsluni og at spæla við skili í skúlagarðinum.

Bið næmingarnar standa í mittasta ringinum í myndini, ið tú hevur gjørt í flokkshølinum. Sig teimum, at teir nú standa í økinum, sum hevur við ábyrgd av sær sjálvum at gera.

Gev næmingunum eina løtu at hugsa um minst eitt dømi um ábyrgd, ið teir hava av sær sjálvum.

Bið tríggjar næmingar geva sítt boð upp á ábyrgd, ið teir hava av sær sjálvum:

## Dømi:

- At eta sunnan mat
- At gera skúlating
- At busta tenn
- At sova væl

Bið næmingarnar stilla seg í næsta ringin, sum ímyndar vinir og familju. Gev næmingunum eina løtu til at hugsa um minst eitt dømi um ábyrgd, ið teir hava av teimum, sum teir eru góðir við. Bið síðan næmingarnar siga einum øðrum næmingi teirra svar.

## Dømi:

- Eg ansi eftir mínum systkjum.
- Eg tømi uppvaskimaskinuna.
- Eg hyggi at dystum hjá mínum vinum.

Bið næmingarnar stilla seg í uttasta ringin, sum ímyndar samfelagið. Gev næmingunum eina løtu til at hugsa um minst eitt dømi um ábyrgd, teir hava av samfelagnum og umhvørvinum. Hetta eru fólk, sum tey kanska ikki kenna persónliga.

Far síðan kring ringin og spyr nakrar næmingar, hvat tey hava hugsað.

## Dømi:

- Eg komi til venjing og í skúla til tíðina.
- Eg dálki ikki náttúruna.
- Eg tosi fólkaliga við øll.

*Uppgáva 2: 15 minuttir*

# Kenn tína ábyrgd á netinum

Greið næmingunum frá, at tú hevur somu ábyrgd av tær sjálvum, tínum nærmastu og tínum samfelagi, tá tú ert á netinum, sum tá tú ikki ert á netinum.

Bið næmingarnar standa uttanfyri ábyrgdarringarnar. Sig teimum, at tú nú fert at lesa nakrar setningar upp, og at tey stillisliga skulu stilla seg í tann ringin, sum tey halda samsvara við setningin.

Til dømis um tú sigur: "Eg sigi ikki mítt fulla navn fyri fólkum á netinum, sum eg ikki kenni," so skulu tey stilla seg í innasta ringin, tí hetta hevur við ábyrgd av einum sjálvum at gera.

Les hesar setningar hart, og gev næmingunum tíð til at flyta seg upp á pláss millum hvønn setningin:

| | |
|---|---|
| Eg eri vinalig/ur og tosi við virðing við onnur á netinum. | Samfelag |
| Eg sigi ikki fólkum á netinum, hvar vit búgva. | Vinir og familja |
| Eg tosi bara við fólk, sum eg kenni, tá eg ikki eri á netinum. | Sjálv/ur |
| Eg leggi bert myndir og video av vinum á netið, um eg havi spurt tey fyrst. | Vinir og familja |
| Eg taki ongantíð lut í happing á netinum. | Samfelag |
| Eg vitji bert heimasíður, sum eru tryggar og hóska til mín aldur. | Sjálv/ur |
| Eg taggi (frámerki) bert myndir og video av vinum, um eg havi spurt tey fyrst. | Vinir og familja |
| Eg deili ongantíð privatar upplýsingar um mínar vinir við onnur. | Vinir og familja |
| Eg nýti ikki tekstir hjá øðrum, og sigi, at eg havi skrivað teir. | Samfelag |
| Eg ansi eftir, ikki at nýta ov nógva tíð á netinum. | Sjálv/ur |
| Eg nýti góðan málburð á netinum, tá eg skrivi til onnur. | Samfelag |
| Eg nýti ikki dulnevni ella falskar profilar á netinum. | Samfelag |

Tak samanum við næmingunum, at tey hava ábyrgd av egnum atburði, sama um tað er á netinum ella ikki. Eggja teimum til at taka hesa ábyrgd í álvara – bæði á netinum og uttanfyri netið. Tí at taka ábyrgd er avgerandi, tá vit vilja vera góðir limir í tí samfelagnum, vit øll hoyra til.

Gev næmingunum *næmingaskjal 1* (síða 7) og *2* (síða 8) og lat teir fylla tey út.

## *Samanumtøka: 5 minuttir*

Tú kanst nýta hesar spurningar at kanna eftir, um næmingarnir hava skilt lærusetningin.

*Spyr:* Hvørjir eru teir tríggir ábyrgdarringarnir?

- Sjálv/ur, vinir og familja, samfelag.

*Spyr:* Nevn eina týdningarmikla ábyrgd, tú hevur á netinum?

- Svarini eru allarhelst ymisk. Bið tey hugsa um teir tríggjar ymisku ringarnar, og hvussu vit hava ymisk sløg av ábyrgd av okkum sjálvum og øðrum á netinum.

*Spyr:* Er nøkur ábyrgd fyri øðrum, sum vit hava bæði á netinum og uttanfyri?

- Svarini eru allarhelst ymisk. Kanska onkur sigur: *Tú skalt vera móti øðrum, sum tú vilt, at tey skulu vera móti tær*. Helst siga tey, at vit skulu vera vinalig móti øðrum, uttan mun til um vit eru á netinum ella ikki.

*Næmingaskjal 1*

# Ábyrgdarringarnir

Niðast á síðuni eru nakrir setningar. Klipp teir út, og legg teir á Ábyrgdarringatalvuna, har tú heldur, at teir skulu vera.




*Klipp hesi út og legg á Ábyrgdarringatalvuna*

| | | |
|---|---|---|
| Eg ansi eftir mínum loyniorðum | Eg eri ikki við til happing á netinum | Eg sigi mína hugsa virðiliga |
| Eg fái loyvi frá vinum, áðrenn eg leggi myndir av teimum á netið | Eg gevi ikki fólkum, ið eg bert havi hitt á netinum, mítt telefonnummar | Eg sendi ikki nakað víðari, ið onnur kunnu vera kedd av |

*Næmingaskjal 2*

# Ábyrgdarringarnir

1. Les svarmøguleikarnar niðanfyri. Øll eru dømi um, hvussu tú tekur ábyrgd av tær sjálvum/sjálvari, tínum vinum og familju ella samfelagnum. Skriva bókstavin til hvønn svarmøguleika á rætta stað á *Ábyrgdaringatalvuni* niðanfyri.

   **a.** Eg spyrji, áðrenn eg brúki eina stuttliga mynd av mínum vini á netinum.
   **b.** Eg havi einans vinaligt málbrúk, tá eg samskifti á netinum, við fartelefon o.ø.
   **c.** Eg haldi mítt loyniorð loyniligt.




2. Vinir á sosialu miðlunum, spælarar sum kjatta í spølum á netinum, og liðfelagar mínir á ítróttarliðnum, eru allir partar av ______________________________ (vel rætta svarmøguleikan niðanfyri).

   **a.** Ítrótti.
   **b.** Felagsskapum.
   **c.** Talgildu miðlunum.

3. Hvat merkir tað, at vera ein góður talgildur borgari?

   **a.** At vera ein góður vinur á netinum.
   **b.** At vinna spøl á netinum.
   **c.** At hava virðing fyri øðrum á netinum.

*Svar:*
*1: sjálv/ur=c, vinir og familja=a, samfelag=b*
*2: Rætta svarið er b. Ein felagsskapur er ein bólkur av fólkum við somu bakgrund ella við somu áhugamálum.*
*3: Rætta svarið er c. Ein góður talgildur borgari er ein, sum er umhugsin og hevur virðing í sínari internetnýtslu.*

# Heimasetningur

*– saman við foreldrum/vaksnum*

# Ábyrgdarringarnir

- Vit taka ábyrgd – eisini á netinum.
- Vit eru øll talgildir borgarar, og hetta merkir, at vit eru partar av einum heimsumfatandi samfelag, sum er bundið saman av internetinum.
- Vit eru góðir talgildir borgarar, og vit taka ábyrgd – bæði fyri okkum sjálvum, okkara vinum og okkara umhvørvi:

## Gerið eitt eintak av ábyrgarringunum heima

- Tekna ringarnar á eitt pappír.
- Nevn tann innasta *Eg*, tann mittasta *Vinir og familja* og tann uttasta *umhvørvi*.
- Tosið um, hvørja ábyrgd tit hava í ymsu ringunum, og skrivið á.
- Tá vit halda okkum til heimasíður, ið eru tryggar og aldurssvarandi, taka vit ábyrgd av okkum sjálvum.
- Tá vit spyrja, áðrenn vit leggja myndir út av øðrum, taka vit ábyrgd av okkara vinum og familju.
- Tá vit nýta góðan málburð á netinum, taka vit ábyrgd av okkara umhvørvi.



Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

PRENT: FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705